KÍ-EB/Streymur:

# Tveir tystir partar í Klaksvík

**Hvørki hjá KÍ ella EB/Streymi, sum í kvøld hittast í Klaksvík, hevur tað gingið soleiðis, sum teir høvdu vónað og kanska roknað við**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Í kvøld fer KÍ fyri fyrstu ferð á heimavøllin, síðani formaðurin Gestur Hovgaard legði frá sær og síðani Oddbjørn Joensen gjørdist venjari. Enn er tað iki greitt, hvør verður hjálparvenjari hjá honum. Men tað er greitt, at tað verður ikki D. J. Joensen, sum hevur verið hjálparvenjari hjá Ove Flindt Bjerg, og sum eisini undanfarnu árini fleiri ferðir hevur verið stuðul hjá KÍ venjarunum.

- Eg havi sagt við spælararnar, at teir skulu sleppa øllum ótta fyri at gera mistøk. Teir skulu spæla fótbólt, tí tað veit eg, at teir duga. 4-3-3 spælskipanin leggur upp til, at bólturin verður fluttur nógv, og at spælararnir arbeiða nógv fyri hvørjum øðrum. Í álopspartinum er alneyðugt, at vongspælið fæst at rigga, sigur Oddbjørn Joensen.

Í Klaksvík eru allir teir, sum vóru á Tvøroyri tøkir. Umframt teir, sum komu á vøllin, var Marek Wierzbicki við á Sevmýri. Hann hevur ikki sáttmála við KÍ í ár, men hann arbeiðir har norðuri, og so spælir hann við 3. deild. Eisini í kvøld verður Marek á dómaraseðlinum.



*Í fjør smekkaði Atli Danielsen eina frísparksperlu í kassan móti EB/Streymi, men samanlagt rakk tað bert til javnleik*

### Funnu stríðsviljan

Tá ið ÍF vitjaði á Mølini, endaði tað við javnleiki. Í EB/Streymi harmast teir um, at tað ikki eydnaðist at fáa fulla úrtøku, men teir gleddust samstundis um, at stríðsviljin var, sum hann hevur verið undanfarnu árini. Teir hava higartil í ár ikki verið nøgdir við hugburðin.

Teitur Joensen, sum í fjør var í Fuglafirði, var sunnudagin fyri fyrstu ferð aftur á besta liðnum hjá EB/Streymi, og hann tóktist vera sannur fongur í høgra borði. Hann skoraði eitt mál, og fleiri ferðir setti hann við snildum dragingum trýst á ÍF verjuna.

Sorin Anghel og Sonni L. Petersen skoraðu í fjør eina rúgvu av málum. Higartil í ár hava teir verið sørir, men kanska var tað fráboðan um betri tíðir, tá ið Sonni L. Petersen setti bóltin í ÍF málið. Hetta taldi kortini ikki, tí Sonni var rangstaddur.

EB/Streymur, Sonni L. Petersen og Sorin Anghel hava fleiri ferðir argað klaksvíkingar.

Síðst tá ið KÍ var á heimavølli mitt í viku gekk einki serligt. Tá taptu spældu teir ikki væl, og teir taptu 2-0 móti Skála.

HB-ÍF:

## Vilja hava uppreisn

**Meistararnir ætla sær uttan iva at hevna tapi í steypakappinginí, nú ÍF aftur vitjar**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað var mest átøkt eini sensatión, tá ÍF fyri lítlari viku síðani sendi HB úr steypakappingini. Enntá í Gundadali.

Mikukvøldið hittast so aftur. Aftur er tað Gundadalur, sum er karmur um dystin.

Men hesa ferð vilja tey í HB í øllum førum ikki hava nakra endurtøku. Skal liðið fylgja við í oddinum, er ein sigur eisini altavgerandi.

Til dystin hevur HB at kalla alt fólkið tókt. Spurningurin er so, um samansetingin hjá Heine Fernandez hesaferð verður tann sama, sum hon var á Skála, ella um kortini verða blandað øðrvísi hesaferð.

Eisini Petur Simonsen hevur mest sum allar sínar mans tøkar, tá hann nú skal royna at endurtaka sigurin frá steypakappingini. Einasta undantakið er Eyðálvur Petersen, sum hevur verið skaddur seinastu tíðina, og sum helst ikki verður tøkur mikudagin.

Og í Fuglafirði tykjast tey trúgva upp á møguleikan fyri eini endurtøku. Gongdin hjá ÍF hevur higartil verið framúr, og megna teir enn einaferð at draga fult á útivølli, hava teir av álvara lagt seg út í heiðursmerkjastríðið.


STUBBIN
í Kvívík
letur upp hósdagin 12.mai kl. 14

Kom og síggj okkara stóra úrvæl av útgerð til ta aktivu frítíðina.

Tilboð hesa vikuna:



**Viðfestisvognar til einhvønn tørv**

BRENDERUP

| | | |
|---|---|---|
| 1205S | kr. | 7.995 |
| Næsahjól (komplett) | kr. | 560 |
| Presending | kr. | 568 |
| Vanligur prísur | kr. | 9.123 |
| **Alt fyri bert:** | **kr.** | **7.995** |

**Húsvognar til sølu og leigu**
Vognarnir hava alla nútímans útgerð



**Prísur frá:** **kr. 99.950** HOBBY



**Frítíðarbátar til sølu og leigu**
510 Crusier - 60 hk motor

ØRNVIK

| | | |
|---|---|---|
| Vanligur prísur: | kr. | 156.435 |
| **Tilboð:** | **kr.** | **133.990** |

**Mercury Bátamotorar**
15 MH 2-takts




| | | |
|---|---|---|
| Vanligur prísur: | kr. | 20.110 |
| Tilboð: | kr. | 16.995 |

MERCURY

Opið er:
Hósdagin til kl. 20.00
Frí- og ley kl. 09.00 - 20.00

STUBBIN
í Kvívík
tel. 421 805
www.stubbin.fo

Sosialurin



*Ráðstevna um ES í Norðurlandahúsinum*
*13. mai 2005*

Fríggjadagin 13. mai verður skipað fyri ráðstevnu um ES. Endamálið við ráðstevnuni er at kunna um ES og birta uppundir orðaskifti um ES í Føroyum. Tí verður dentur lagdur á at varpa ljós á ymiskar hættir fyri samstarvi við ES.

***Skrá:***

**Kl. 10.00 Løgmaður bjóðar vælkomin**
**Kl. 10.15 Føroyar og ES – Verandi støða og framtíðar útlit**
*Herluf Sigvaldsson, deildarstjóri á Uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni*
**Kl. 10.50 Støðan í ES – Hvat bjóðar framtíðin? Hvat fer hettar at merkja fyri viðgerðina av Føroyum í ES**
*Poul Skytte Christoffersen, fyrrverandi ES-sendiharri hjá Danmark. Núverandi danskur sendiharri í Italia.*
**Kl. 11.25 Felags fiskivinnupolitikkurin í ES – Hvussu hevði støða Føroya verið sum limur?**
*Svend Bech Kristensen, heiðursstjóri í Evropiska Ráðnum, fyrrverandi stjóri fyri fiskivinnupolitikkinum á aðalskrivstovuni hjá Ráðnum.*
**KL. 12.00 Døgurðasteðgur**
**Kl. 13.00 EBS samstarvið – Hvørjar royndir hevur Ísland gjørt sær?**
*Kjartan Jóhannsson, íslendskur sendiharri í Brússel.*
**Kl. 13.35 Limaskapur, EBS ella sveisiska loysnin**
*Torben Foss, advokatur og partnari í PricewaterhouseCoopers í Bergen. Hevur verið við til at skriva frágreiðing um evnið fyri Norsk Utenrikspolitisk Institut - NUPI*
**Kl. 14.15 Álendska loysnin**
*Elisabeth Nauclér, fyrisitingarstjóri í álendsku stjórnini*
**KL. 15.00 Steðgur**
**Kl. 15.30 Spurningar og kjak**
*Fyrilestrarhaldararnir sita við pallborð*
**Kl. 17.00 Liðugt**

**Tekna teg** á www.tinganes.fo undir “Førleikamenning og skeið”, Ráðstevna um ES, ella við at ringja til Løgmansskrivstovuna á tlf. 351053 ella tlf. 351051. Luttøkugjaldið er 1.000 krónur.

Sosialurin 341800